## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Bingovinningur í Rás2:

# Gudny Mikkelsen vann Suzuki bilin



*Týsdagin 21. desember bleiv bingovinningurin hjá Rás2, ein Suzuki Ingnis, latin hjá Sp/f Eyðbjørn Hansen við Varðagøtu, f.v.: Petur Jacobsen frá Rás2, Esmar og Dora Mikkelsen og synirnir Mortan og Jónas. Uttast til høgru er Eyðbjørn Hansen Mynd: Jens Kristian Vang*

**Síðan apríl 2004 hevur Rás2 havt eina kapping koyrandi, har fólk við at keypa bingoheftir vóru við í lutakastinum um ein Suzuki Ignis 1,3.**

Leygardagin 18. desember var lutakastið í Rás2, og hepni vinnarin varð Gudny Mikkelsen í Syrðugøtu.

Týsdagin 21. desember varð bilurin latin hjá Sp/f Eyðbjørn Hansen við Varðagøtu. Við tað at Gudny Mikkelsen í løtuni er stødd Danmark, varð tað sonurin, Esmar Mikkelsen, konan Dora, og synirnir Mortan og Jónas, sum heintaðu vinningin.

Í dag, hósdagin 23. desember, verður Gudny heintað á flogvøllinum í nýggja bilinum.

# Próvtøkur á Klaksvíkar Sjómansskúla

**Fríggjadagin 17. desember fingu næmingar á Klaksvíkar Sjómansskúla sjóvinnu- og kokkaprógv handað.**



*Sjóvinnunæmingar, f.v.: Jóannes Mikkelsen, Vestmanna, John Martin Andreasen, Vestmanna, Áki Davidsen, Kvívík, Vagnur Nolsøe Kjærbeck, Trongisvágur, Trygvi Jacobsen, Argir, Egil Heinesen, Vestmanna, Andras Magnussen, Glyvrar, Magnus Frederik Joensen, Kvívík, Jóannes Arge, Argir, og Evald Signar Müller, Kvívík.*
*Virðirlønir: John Martin Andreasen og Evald Mùller fingu virðisløn fyri gott avrik.*



*Kokkanæmingar, aftara rað f.v.: Martin úr Fugloy Justesen, Hvannasund, Egi Gothard Danielsen, Strendur, Henry Samuelsen, Tórshavn, Rasmus Johannesen, Tórshavn, John Johansen, Trongisvágur, og Kim Hentze, Skopun.*
*Aftara rað, f.v.: Hjørdis Anna Petersen, Hov, Kári Smidt Joensen, Toftir, Fríðbjørg Pétursdóttir, Miðvágur, Jónleif Petersen, Strendur, og Fróði Abrahamsen, Strendur.*
*Virðislønir: Martin úr Fugloy Justesen og Egi Gothard Danielsen fingu virðisløn fyri gott avrik.*